# HS SprintOpen 2002



*Hóast fyrireikararnir høvdu vónir um væl størri tal av luttakarum, so gekk kappingin sum heild væl, og var hetta eitt gott høvi hjá ymsu feløgunum at koma veruliga í gongd við svimjiárið*

*Mynd: Øssur Mohr*

**Um vikuskiftið skipaði Havnar Svimjifelag fyri fyrstu ferð fyri sonevndu SprintOpen kappingini**

SVIMJING

*Jákup Mørk*

Sum ein liður í uppstartinum til eitt nýtt svimjiár, varð í døgunum, 30-31 august, fyri fyrstu ferð skipað fyri sonevndari sprintkapping, har talan í mesta mun var um stuttar teinar. Samstundis var hetta seinasti møguleikin hjá teimum svimjarum, sum annars skulu flyta bólk, at seta bólkamet, við tað at tey kundu luttaka í somu aldursbólkum, sum tey gjørdu undanfarnu vetrarhálvuna.

Tá talan var um fyrstu kappingina á árinum, gjørdist talan tó ikki um tey nógvu bólkametini. Bert eitt nýtt met varð sett, og var tað Pauli Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, sum fekk hetta í kappingini, 200 m frí.

Frá fyrireikarunum verður sagt, at tey høvdu vónir um væl fleiri tilmeldingar, enn talan var um, og millum annað luttøku Vágs Svimjifelag og Skeggjar als ikki. Luttakandi feløgini vóru sostatt Havnar Svimjifelag, Tvøroyrar Svimjifelag, Fuglafjarðar Svimjifelag, Flot av Toftum og Ægir úr Klaksvík.

Sum heilt gekk annars væl at avgreiða kappingina, og eftir lokna kapping kundi staðfestast, at býtið av heiðursmerkjum hevði verið sum niðanfyristandandi:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| HS | 11 | 18 | 19 |
| TS | 11 | 3 | 3 |
| Ægir | 9 | 6 | 5 |
| FS | 6 | 6 | 5 |
| Flot | | 3 | 1 |

Niðanfyri prentað vit úrslitini í ymsu kappingunum.

# Úrslit frá HS SprintOpen 2002

| Nr. Navn | Ár Felag | Tíð |
|---|---|---|
| **25 m firvald, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.15.34 |
| 2 Helga Djurhuus | 89 HS | 0.15.76 |
| 3 Lisbeth Joensen | 87 HS | 0.16.02 |
| **25 m firvald, menn** | | |
| 1 Kristian Olsen | 85 Ægir | 0.13.84 |
| 2 Janus T. Olsen | 86 HS | 0.14.09 |
| 3 Johan Martin Poulsen | 80 FS | 0.14.30 |
| **25 m rygg, kvinnur** | | |
| 1 Elida Bjarnadóttir | 88 HS | 0.16.45 |
| 2 Rannvá Jacobsen | 82 HS | 0.16.90 |
| 3 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.16.97 |
| **25 m rygg, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 0.14.63 |
| 2 Janus T. Olsen | 86 HS | 0.15.83 |
| 3 Ari AVárana | 87 HS | 0.16.50 |
| **100 m bringa, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 1.24.89 |
| 2 Herborg Silja Strøm | 87 HS | 1.32.84 |
| 3 Karin Krist. Eysturberg | 88 TS | 1.35.30 |
| **100 m bringa, menn** | | |
| 1 Ólavur Eysturdal | 86 Ægir | 1.20.52 |
| 2 Per S. Hansen | 88 Flot | 1.21.41 |
| 3 Aksal Holm NorÐfoss | 87 HS | 1.22.60 |
| **200 m blandað, kvinnur** | | |
| 1 Natalia Reinert | 89 Ægir | 2.58.13 |
| 2 Anita Højgaard | 90 FS | |
| **200 m blandað, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 2.21.44 |
| 2 Andrass Thomsen | 82 HS | 2.22.81 |
| 3 Jón Absalonsen | 87 HS | 2.32.79 |
| **100 m frí, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 1.07.50 |
| 2 Helga Djurhuus | 89 HS | 1.07.77 |
| 3 Guðrun Magnussen | 88 HS | 1.13.11 |
| **100 m frí, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 0.59.11 |
| 2 Kristian Olsen | 85 Ægir | 1.00.64 |
| 3 Aksal Holm NorÐfoss | 87 HS | 1.01.83 |
| **4X50 m blandað, mix** | | |
| 1 Ts TS | 2.13.47 | |
| 2 Hs 2 | HS | 2.13.48 |
| 3 Hs 1 | HS | 2.15.35 |
| **25 m bringa, menn** | | |
| 1 Johan Martin Poulsen | 80 FS | 0.16.63 |
| 2 Beinir Danielsen | 88 Flot | 0.17.21 |
| 3 Ólavur Eysturdal | 86 Ægir | 0.17.25 |
| 3 Rúni Klein Hansen | 89 HS | 0.17.25 |
| **25 mm bringa, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.17.56 |
| 2 Bára Joensen | 85 Ægir | 0.17.90 |
| 3 Karina Petersen | 80 FS | 0.17.96 |

| Nr. Navn | Ár Felag | Tíð |
|---|---|---|
| **25 m frí, menn** | | |
| 1 Kristian Olsen | 85 Ægir | 0.12.27 |
| 2 Johan Martin Poulsen | 80 FS | 0.12.58 |
| 3 Sonni Eliasen | 79 FS | 0.13.03 |
| **25 m frí, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.13.93 |
| 2 Bardur Joensen | 85 Ægir | 0.14.03 |
| 3 Sára Ejdesgaard | 87 TS | 0.14.33 |
| **100 m firvald, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 1.04.89 |
| 2 Jón Absalonsen | 87 HS | 1.05.64 |
| 3 Ólavur Eysturdal | 86 Ægir | 1.13.97 |
| **100 m firvald, kvinnur** | | |
| 1 Natalia Reinert | 89 Ægir | 1.20.42 |
| **200 m frí, menn** | | |
| 1 Jákup Ø. Mohr | 89 FS | 2.24.57 |
| 2 Pauli Ø. Mohr | 91 FS | 2.46.69 |
| **200 m frí, kvinnur** | | |
| 1 Helga Djurhuus | 89 HS | 2.29.11 |
| 2 Natalia Reinert | 89 Ægir | 2.38.77 |
| 3 Vár Jacobsen | 88 HS | 2.41.11 |
| **100 m rygg, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 1.05.30 |
| 2 Ari AVárana | 87 HS | 1.14.17 |
| 3 Jón Absalonsen | 87 HS | 1.14.44 |
| **100 m rygg, kvinnur** | | |
| 1 Karina Petersen | 80 FS | 1.15.53 |
| 2 Rannvá Jacobsen | 82 HS | 1.18.84 |
| 3 Natalia Reinert | 89 Ægir | 1.25.68 |
| **50 m firvald, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.33.64 |
| 2 Lisbeth Joensen | 87 HS | 0.33.74 |
| 3 Helga Djurhuus | 89 HS | 0.33.99 |
| **50 m firvald, menn** | | |
| 1 Kristian Olsen | 85 Ægir | 0.29.84 |
| 2 Ólavur Eysturdal | 86 Ægir | 0.31.24 |
| 3 Rúni K. Hansen | 89 HS | 0.34.00 |
| **200 m bringa, kvinnur** | | |
| 1 Karina Petersen | 80 FS | 3.01.34 |
| 2 Karin Krist. Eysturberg | 88 TS | 3.24.87 |
| **200 m bringa, menn** | | |
| 1 Olavur Eystadal | 86 Ægir | 2.57.82 |
| 2 Per S. Hansen | 88 Flot | 2.59.94 |
| 3 Rúni Klein Hansen | 89 HS | 3.04.68 |
| **50 m rygg, kvinnur** | | |
| 1 Sára Ejdesgaard | 87 TS | 0.35.53 |
| 2 Rannvá Jacobsen | 82 HS | 0.36.11 |
| 3 Elida Bjarnadóttir | 88 HS | 0.37.04 |

| Nr. Navn | Ár Felag | Tíð |
|---|---|---|
| **50 m rygg, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 0.30.63 |
| 2 Andrass Thomsen | 82 HS | 0.31.04 |
| 3 Janus T. Olsen | 86 HS | 0.31.76 |
| **200 m rygg, kvinnur** | | |
| 1 Karina Petersen | 80 FS | 2.41.89 |
| 2 Helga Djurhuus | 89 HS | 2.44.30 |
| 3 Sára Ejdesgaard | 87 TS | 2.55.77 |
| **400 m frí, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 4.32.92 |
| 2 Andrass Thomsen | 82 HS | 4.33.01 |
| 3 Janus T. Olsen | 86 HS | 4.54.78 |
| **50 m bringa, kvinnur** | | |
| 1 Benthe S. Andersen | 82 TS | 0.37.75 |
| 2 Karina Petersen | 80 FS | 0.39.41 |
| 3 Bára Joensen | 85 Ægir | 0.40.20 |
| **50 m bringa, menn** | | |
| 1 Ólavur Eysturdal | 86 Ægir | 0.36.92 |
| 2 Aksal Holm NorÐfoss | 87 HS | 0.37.14 |
| 3 Johan Martin Poulsen | 80 FS | 0.37.43 |
| **100 m blandað, kvinnur** | | |
| 1 Karina Petersen | 80 FS | 1.16.80 |
| 2 Helga Djurhuus | 89 HS | 1.18.46 |
| 3 Natalia Reinert | 89 Ægir | 1.21.88 |
| **100 m blandað, menn** | | |
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 HS | 1.07.98 |
| 2 Kristian Olsen | 85 Ægir | 1.10.37 |
| 3 Jón Absalonsen | 87 HS | 1.11.37 |
| **50 m frí, kvinnur** | | |
| 1 Benthe Sikivat Andersen | 82 TS | 0.30.07 |
| 2 Sára Ejdesgaard | 87 TS | 0.30.69 |
| 3 Lisbeth Joensen | 87 HS | 0.30.95 |
| **50 m frí, menn** | | |
| 1 Kristian Olsen | 85 Ægir | 0.26.54 |
| 2 Johan Martin Poulsen | 80 FS | 0.27.70 |
| 3 Aksal Holm NorÐfoss | 87 HS | 0.28.03 |
| **4X50 m frí, menn** | | |
| 1 Hs 1 | HS | 1.53.31 |
| 2 Fs FS | 1.59.86 | |
| 3 Flot | Flot | 2.03.35 |
| **4X50 m frí, kvinnur** | | |
| 1 Ts TS | 2.05.96 | |
| 2 Hs 1 | HS | 2.09.80 |
| 3 Fs Ægir | FS | 2.11.85 |



# Metstórur áhugi

**Ikki minni enn tvær týskar sjónvarpsstøðir fara at senda frá dystinum, tá Føroyar og Skotland spæla leygardagin**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk*



*- Snøgt sagt eitt og hvørt skotskt blað við respekt fyri sjálvum hevur boðað frá, at tey vera til staðar, og úr Týsklandi eru at kalla øll tey stóru dagbløðini eisini við, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF*

Tað var helst væntandi, at stórur áhugi fór at vera fyri dystinum, nú skotar koma til Føroya. Í Skotlandi og Stórabretlandi yvirhøvur er áhugin fyri fótbóltinum ovurstórur, og mest sum allir dystir í fremstu fótbóltsrøðunum og í altjóða høpi verða so ella so varpaðir á sjónvarpsskíggjum, og soleiðis verður væntandi eisini hesaferð

Umframt áhugan úr Skotlandi, so er tað eisini so, at týskir miðlar sýna dystinum sera stóran ans. Eitt er, at Føroyar og Týskland eru í sama bólki, men ikki minst tykist tað eisini vera galdandi, at tað er fyrrverandi týski landsliðsvenjarin, Berti Vogts, sum nú hevur ábyrgdina av landsliðnum. Umframt at vera fyrrverandi landsliðsvenjari, taldist Vogts saman við hjálparvenjara sínum, Rainer Bonhoff, millum álitini á týska stórliðnum, sum upp ígjøgnum sjeytiárini taldist millum tey allar mætastu í heiminum.

### Fjølmiðlamet

Av skrivstovuni hjá ÍSF verður eisini sagt, at tey ongan tíð áður hava merkt ein somikið stóran áhuga fyri einum føroyskum landsdysti.

- Snøgt sagt eitt og hvørt skotskt blað við respekt fyri sjálvum hevur boðað frá, at tey vera til staðar, og úr Týsklandi eru at kalla øll tey stóru dagbløðini eisini við, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá Fótbóltssambandinum.

Fyrrapartin týsdagin var hann í fer við at leggja seinastu hond á listan yvir fjølmiðlafólk, og fyri fyrstu ferð yvir høvur verður samlaða talið av fjølmiðlafólkum oman fyri tey 100, tá dysturin verður blástur ígongd.

Alt hetta ger tó ikki, at kassin hjá FSF bólgnar. Rættindini til landsdystirnar hevur FSF fyri langari tíð síðani avreitt til miðlafyritøkuna, UFA, sum so letur eitt frammanundan avtalað gjald, sum er ásett eftir, hvørjum londum vit koma í bólk saman við.

Hinvegin veðrur roknað við, at áhugaverdu mótstøðuliðini kunnu geva eyka inntøkur á áskoðarasíðuni. Sum vit áður hava nevnt, so verða eini 600 skotstk viðhaldsfólk í Føroyum komandi dagarnar, og veðrið somikið gott, sum seinastu forsøgnirnar siga, er als ikki óhugsandi, at talan verður um fullsettan leikvøll á Svangaskarði.

# Eru til reiðar

**Á Toftum eru tey sjálvandi spent, nú tey skulu herberga fleiri enn 100 fjølmiðlafólkum, men tey bera tó ikki ótta fyri, at uppgávan er ov møtumikil**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk*

Tað er ikki altíð, at nakað serligt ljós verður á uppgávuna, sum fyrireikararnir av einum landsdysti hava, men tað er tó givið, at tað eru nógvir endar at flætta saman á Toftum í hesum døgum.

### Fer at ganga

Sum nevnt aðrastaðni, so verður talan um fleiri enn 100 fjølmiðlafólk, umframt at áskoðararnir helst verða heilt nógvir í tali, men hesum bera tey tó ikki ótta fyri á Toftum.

- Vit hava jú áður havt stórar dystir her. Eitt nú vóru heilt nógv fjølmiðlafólk á staðnum, tá Spania spældi her, men omanfyri 100 hava tey tó ongan tíð verið, sigur Niclas Davidsen. Formaður í B68 og kanska meira enn nakar drívmegin aftan fyri leikvøllin á Svangaskarði.

- Vit eru sjálvandi spent upp á, hvussu alt fer at spæla av, men eg haldi ikki, at vit bera ótta fyri, at tað ikki skal ganga. Hóast 100 fjølmiðlafólk ljóðar av nógvum, so skal eisini minnast til, at øll hesi ikki skulu sita á sama stað. Skrivandi fólkini sita eitt stað, Sjónvarpið hevur síni høli, frásøgufólkini fáa hvør sítt rúm á ovastu hæddini og myndamenninir ganga kring vøllin, so alt í alt man tað nokk fara at ganga, heldur formaðurin.

- Viðvíkjandi áskoðarum, so eru tað ikki vit men løgreglan, sum hevur ábyrgdina av hesum, meðan vit so hjálpa til. Her hava vit tó áður havt fullsettan leikvøll, so eg beri ikki ótta fyri, at tann parturin skal geva nakrar stórvegis trupulleikar. Eisini tí at bæði skotar og føroyingar vanliga skikka sær hampuliga væl, tá landsdystir eru. Eisini hóast tey kanska kunnu gartera eitt sindur, meðan dysturin stendur á, sigur Niclas Davidsen at enda.



*Niclas Davidsen sigur, at sjálvandi er nógv at takast við, tá áhugin fyri einum landsdysti er somikið stórur, men hann ber tó ikki ótta fyri, at uppgávan hjá teimum verður ov møtumikil*

## Máltindurin menn

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 15 |
| John Petersen | B36 | 10 |
| Jón Rói Jacobsen | HB | 10 |
| Øssur Hansen | B68 | 8 |
| Sámal Joensen | GÍ | 8 |
| Kurt Mørkøre | KÍ | 8 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 7 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 6 |
| Bárður Mortansson | B36 | 5 |
| Súni Fríði Johannesen | GÍ | 5 |
| Hans á Lag | HB | 5 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 5 |
| Óli Hansen | NSÍ | 5 |
| Egil Zachariasen | B36 | 4 |
| Jákup á Borg | B36 | 4 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 4 |
| Súni Olsen | GÍ | 4 |
| Harley Bertholdsen | KÍ | 4 |
| Ove Nysted | KÍ | 4 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 4 |
| Ulrik Balling | NSÍ | 4 |

## Máltindurin kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| Rannvá Andreasen | KÍ | 13 |
| Malena Josephsen | KÍ | 9 |
| Vivian Bjartalíð | Kí | 5 |
| Heidi Heinesen | GÍ | 4 |
| Eyðfríð Kristiansen | HB | 4 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 4 |
| Anja Weihe | B36 | 3 |
| Arnbjørg Danielsen | B36 | 3 |
| Ása á Neystabø | B36 | 3 |
| Mara Vang | B36 | 2 |
| Hansy Davidsen | B68 | 2 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 2 |
| Jensa Sirdal | Kí | 2 |